

*Spælistovan er opin tríggjar dagar um vikuna fyri børn uttan ansingarpláss.*









**MYNDIR:** ÁLVUR HARALDSEN

# Kom og spæl á Margarinfabrikkini

EITT ÓKENT STAÐ FYRI FJØLDINA, MEN LÍVSNERVIN HJÁ **BØRNUM** OG MAMMUM, SUM IKKI HAVA ANSINGARPLÁSS. – TAÐ ER SO DEILIGT AT KOMA ÚT OG TOSAÐ ANNAÐ ENN BABYMÁL, SIGUR **LISBETH SÓLSKER**, SUM ER Í SPÆLISTOVUNI Í MARGARINFABRIKKINI VIÐ DÓTTUR SÍNI.



**BØRN**

Inna Tørnroos
inna@sosialurin.fo

Spælistovan í Margarinfabrikkini er opin tríggjar dagar í vikuni. Fyrr húsaðist Spælistovan í Meinigheitshúsinum, men fyri fýra árum síðani flutti virksemi oman í Margarinfabrikkina í Tórsgøtu.

Einar fýra til tíggju mammur møta hvønn mánadag, týsdag og hósdag í Spælistovuni. Børnini spæla á stóra gólvinum við alskyns leikum, og mammurnar fáa sær ein drekkamunn saman við leiðaranum Jónvør Jacobsen og vaskikonuni Shirley Jespersen.

Fyri 20 krónur um dagin fáa mammur og børn kaffi, te, franskbreyð og frukt.

– Tær flestu mammur, sum koma her, ganga og bíða eftir at fáa ansingarpláss til børnini, sigur Jónvør Jacobsen.

Tað er eitt sindur tómligt í Spælistovuni í august og januar, men sum frálíður koma fleiri børn og mammur á vitjan.

Børnini eru úr níggju mánaðum til eini trý ár. Leikurnar eru tí tillagaðar teimum ymisku aldursbólkunum.

Frá klokkan 9 um morgunin til 11.30 spæla og hugna mammurnar og børnini sær. Allar mammur eru á einum máli um, at hetta tilboðið er sera gott og stimbrandi fyri børnini, sum hava gott av at koma út.

## INNIHALD

4 PERSÓNSSØGA: **MARIANN POULSEN VERJIR SEG**
6 TIPS: **SILVURBLANKT**
7 90 SEKUND: **GUNVÁ VIÐ KELDU SVARAR**
8 FÍGGJARLÓG: **ANFINN KALSBERG VÍSUR SÍTT VALD**
11 10 TING UM: **LARS LØKKE RASMUSSEN**
12 GREINARØÐ: **FRÁ DEYÐA Í GRØV**
14 TIL ARBEIÐIS: **VIÐ VILLADS BØGESVANG Í LUFTINI**
15 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 REPORTASJA: **SVAVAÐUR SEYÐUR PÍNIST**
18 REPORTASJA: **IVI UM OLJUDREYMIN**
21 VANGAMYND: **STÓRTRÍVIST Í SVARTARI HOLU Í SYÐRUGØTU**
24 UMMÆLI: **YRKINGASAVNIÐ HJÁ TÓRODDI POULSEN**
26 SPYRST SO LIVST: **RIGMOR SVARAR**
27 MÍN BESTA UPPSKRIFT: **HØSNARUNGI Í KILI-RÓMASÓS**
31 TAÐ HENDUR: **KONSERTIR, BØKUR, SENDINGAR OG ANNAÐ**
32 VIKUMYNDIN: **BESTA MYNDIN Í VIKUNI**

VIKUSKIFTI
**Redaktørar:** Inna Törnroos og Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Jensen
**Forsíðumynd:** Marian Poulsen / Jens Kristian Vang

# 5 millióinir – er so sloppið?

**KLUMMA**

Eydna Skaale
eydnaskaale@hotmail.com

Í farnu viku frættist, at fólk við HIV nú fara at sleppa inn í USA. Síðani HIV og AIDS tóku kvørkratak um heimin í 80'unum, hava fólk við hesum diagnosum verið útihýst úr samveldinum fyri vestan.

Landið við justice for all hevur latið milliardir til bardagan móti AIDS og HIV m.a. í Afrika, men meðan peningurin hevur streymað út, hevur leiðin inn verið stongd við lóg.

Hesa lógina fer Barack Obama nú at broyta. Hugburðurin, »Tey sjúku skulu hjálpast, tey skulu bara ikki koma okkum ov nær«, er yt.

Føroyingar lótu farna vikuskifti Krabbameinsfelagnum yvir 5 milliónir. Og tað var gott! Endamálið var gott, og tiltakið var gott. Vit vóru eisini øgiliga stolt aftaná – kanska enntá eitt sindur sjálvfeit. Vit eru so góð og gávumild, at vit fáa næstan ikki gingið.

Paradoksið kom bara, um tú lurtaði eftir søgunum hjá teimum, ið merkja fylgjurnar av sjúkuni. Søgur um einsemi, fremmandagerð og útihýsing, tá harðast stóð á. »Eingin vildi tosa við meg«. »Fólk skiftu gongubreyt, tá eg kom ímóti teimum«. »Eg hevði væntað ávís fólk at ringja ella vitja, men tey hildu seg burtur«. »Eg kendi meg øgiliga einsamalla.«

Vit lata! Jú, meiri enn 5 milliónir. Men markið til lovaða landið er stongt. Vit lata pening, men vit lata ov lítið av okkum sjálvum. Vit vilja ikki, at tey sjúku koma okkum ov nær.

Miskunnsami samariubúgvin lat eisini pening til sjúkrarøkt. Men tað var eftir, at hann sjálvur hevði tikið sær av tí álopna. Fyrst nærveru – síðani pening.

Tað er tørvur á nógvum peningi fyri at basa sjúkunum og hjálpa teimum, ið merkja sviðan. Men tað er eisini tørvur á nærveru. Tí tað er steinur omaná byrðu at kenna seg einsamallan og útifrystan, tá lívsins spælireglur brádliga og óforvarandi verða broyttar. Óansæð hvør orsøkin er.

Tað er gott, at vit lata pening, tað eiga vit at gera. Men er tíðin ikki komin til, at vit, eins og Barack Obama, eisini tora at lata mørkini til okkum sjálvi upp og rúma teimum, ið eru rakt so meint?

Eg haldi tað.